Mugu royna at sleppa undan fleiri verkføllum

– Åvaringarnar eru nú so kraftigar, at vit kunnu ikki sita hendur í favn, heldur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag

LØNARSTEÐGUR OG SKATTALÆTTI
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Vit eru í eini óndari ringrás. Fyri at bróta ringrásina, eru vit heilt einfalt noydd til at fáa álit á hvørjum øðrum aftur, sigur Hans Joensen, formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag

– Fáa vit ikki eina avtalu um lønirnar, er vandi fyri ruðuleika á arbeiðsmarknaðinum.

Tað stúrir Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, fyri.

Hóast nógvar ákoyringar, stendur hann fast um uppskotið um at fáa eina avtalu við landsstýrið um skattalætta og afturfyri skulu fakfeløgini ikki krevja hægri løn.

Hann heldur snøgt sagt, at tað er neyðugt at fáa eina slíka avtalu.

– Gongdin í samfelagnum er nú tann, at verða óvanlig stig ikki tikin, er vandi fyri at alt samfelagið endar aftur í kreppu og so fella allar keylurnar.

Hans Joensen sigur, at arbeiðarafeløgini kunnu ikki standa modell til, at gjógvin ímillum tey tímaløntu og hini í samfelagnum bara veksur og veksur og tí má okkurt gerast.

– Orsøkin til tað drúgva verkfallið í fjør, var júst tann, at vit góðtóku ikki, at munurin ímillum tey tímaløntu og tey fastløntu alsamt vaks.

– Men longu nú eru aftur sáttmálar gjørdur, sum førir við sær, at tey tey tímaløntu aftur eru dragna afturút.

Hans Joensen sigur, at sáttmálar eru gjørdir við fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum, sum hava viðbøtur við sær, sum tað ikki kundi koma upp á tal at geva arbeiðarafeløgunum.

– So hóast vit ikki longu skulu nú skulu siga, hvat fer at henda í næstu samráðingunum í 2005, mugu vit kortini staðfesta, at vandi er fyri, at gongdin á almenna arbeiðsmarknaðinum fer aftur at føra til stór krøv frá arbeiðarafeløgunum undir næstu samráðingunum, bara fyri at halda tørn, so at vit ikki dragna enn meiri afturút.

– Skulu vit so aftur í eitt drúgvt verkfall og hvat endar hetta við, spyr hann.

– Orsøkin til, verkfallið í fjør var ikki annað enn tað, at vit kravdu bara tað sama, sum tey alment løntu fingu og tað kann aftur føra til trupulleikar undir næstu samráðingum uttan at eg við hesum kann siga, hvussu støðan verður í næstu samráðingum. Men vandin er í hvussu so er til staðar.

Skulu hava fulla trygd

Samstundis hevur vinnan fingið tann trupulleika, at hon er við at missa kappingarførið.

– Ávaringarnar um verri tíðir fyri framman, eru greiðar og kraftigar og klárar fiskivinnan ikki at hóra undan, er tað, ein støða, sum vit mugu viðgera í hesum sambandi haldi, at loysn kundi verið at tikið upp trýpartasamráðingar ímillum fakfeløgini, arbeiðsgevararnar og landsstýrið um lønarspurningin.

– Endamálið við teimum samráðingunum skuldi verið, at fakfeløgini halda aftur við lønarkrøvunum, ella seta lønarsteðg í verk.

– Men so mugu vit afturfyri fáa fulla trygd frá landsstýrinum fyri, at skattir og avgjøld lækka, so at vit framvegis kom at hava meiri eftir í lønarposanum og keypiorkan veksur.

– Tað kann gerast við beinleiðis skattalækkingum, við at lækka mvg, við at lækka oljuavgjaldið, fyri at taka nøkur dømi.

Neyðugt við prissteðgi

Samstundis leggur Hans Joensen dent á, at tað verður neyðugt at seta prissteðg í verk, eins og vit skulu hava eitt munagott príseftirlit.

Hans Joensen leggur dent á, at tað verður ongin avskyldina, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hann sigur, at ein orsøk til at onki er hent á hesum øki fyrr, at fakfeløgini hava ikki havt álit á politikarunum og at arbeiðsgevarar og fakfelag ikki havahavt álit á hvørjum øðrum.

– Men hetta er eisini nakað, vit mugu koma burturúr. Skal ongin hava álit á nøkrum, verður eisini ruðuleiki. Vit eru heilt einfalt noydd til at fáa álit á hvørjum øðrum aftur, sigur Hans Joensen.

– Eg eri skuldsettur fyri, at uppskotið um lønarsteðg og skattalætta, er illa umhugsað. Men eg haldi, at júst hetta er rætta tíðin at fara undir at viðgera spurningin, tí nú hava vit næstan hálvtannað ár at viðgera málið í, til næstu samráðingar vera.

– Hetta er ein spurningur, sum krevur ógvuliga drúgva viðgerð og tí er tað ongantíð ov tíðliga at taka hann upp so vit fáa góðar stundir at viðgera hann, leggur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag afturat.

Hann sigur, at kann hetta vera við til at bjarga arbeiðsplássum, bjarga vinnuni og sostatt eisini bjarga samfelagnum, er tað avgjørt vert at viðgera.

Skal vera hugnaligari at velja á Tvøroyri

Løgtingsvalið á Tvøroyri verður flutt inn í stóra skúlan í Trongisvági, har umstøðurnar hjá áskoðarum og áhoyrarum eru nógv betri

LØGTINGSVALIÐ 2004
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Val á kommunuskrivstovuni á Tvøroyri og er fæst ein hóming av, hvussu trongar umstøðurnar eru

Nú skal tað vera hugnaligari at fara á løgtingsval á Tvøroyri.

Tí hevur býráðið gjørt av at flyta valstaðið.

Higartil hevur altíð verið valt á kommunuskriv-stovuni, men har er lítið pláss og ómøguligt hjá fólki at steðga á eina løtu at práta og enn minni at fylgja við uppteljingini.

Tí hava fólk heitt á býráðið um at flyta valstaðið inn í skúlan í Trongisvági, har umstøðurnar eru munandi betri.

Og Kristin Michelsen, borgarstjóri, sigur, at sum sagt so gjørt, so hesuferð skulu tvørafólk venja seg við at fara inn í skúlan í Trongisvági at velja.

Tað er bara eitt minus við skúlanum í Trongisvági og tað er, at hann er so fjarskotin.

Men tað nýtist fólki ikki at óttast fyri, tí býráðið skipar so fyri, at bussar fara at koyra ímillum miðbýin og valstaðið hvønn tíma, allan dagin.

Borgarstjórin sigur, at hetta er fyri at gera eitt sindur meiri burturúr valdegnum og kanska fáa eina sosiala dimensjón upp í valið eisini.

Hetta heldur borgarstjórin hevur týdning, tí vit vita, at fólk eru ógvuliga áhugað í valinum og ikki minst plagdu fólk vera spent at fylgja við, tá ið upptalt verður og inni í skúlanum í Trongisvági eru góðar umstøður.

– Í skúlanum er gott pláss hjá fólki at verða innandura og har er eisini stór matstova, sum eisini verður opin allan dagin.

Brimil funnið áttamannafar

Sjókaðin umborð á Brimli fann sunnumorgunin ein bát, og skjótt varð staðfest, at talan er um eitt frambygt áttamannfar úr Kaldbak, so nógv bendir á, at tað umsíðir er eydnast at finna Hellu, sum ikki kom vegin fram úr Nólsoy til Havnar seinasta mikudag

Tað var ein lítlan hálvfjórðing eystur úr Eystfalsskeri í Nólsoyarfirði, at Brimil sunnumorgunin fann eitt frambygt áttamannafar úr Kaldbak

Mynd: Jens K. Vang

LEITING
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Eftir at hava leitað í fýra dagar, fann Brimil sunnudagin eitt áttamannfar á 30 til 40 metra dýpi við Eystfalssker í Nólsoyarfirði. Og sunnudagin staðfesti Sjóbjargingartænastan, at talan er um eitt áttamannafar líkt Hellu, sum ikki er sædd síðani seinasta mikudag.

Útvarp Føroya segði í tíðindum mánamorgunin, at kavarar fóru niður til bátin, og ætlanin var at seta trossar á bátin og royna at fáa hann upp í heilum líki. Báturin, sum Brimil fann, liggur sum sagt á 30 til 40 metra dýpi ein lítlan hálvfjórðing eystur úr Eystfalsskeri í Nólsoyarfirði.

Orsøkin til, at farið var at leitað júst har, sum áttamannafarið nú er funnið, er, at fólk seinastu dagarnar hava varnast olju, sum bræðaði á sjónum út fyri Eystfalssker.

Bjargingararbeiðið var ikki liðugt, tá blaðið fór til prentingar, so tað fekst ikki váttað áðrenn, um tað var Hella ella ikki. Men sum sagt, so er tað nógv, sum bendir á tað.

Tað er Vaktar- og Bjargingartænasta, sum samskipar bjargingararbeiðið.

Eldur í bili

Um sekstíðina sunnukvøldið fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at eldur var í einum bili á økinum hjá Ivan Johannesen bilasøluni

Eldur kom í bilin um sekstíðina sunnukvøldið, og Sløkkiliðið varð boðsent. Tá Sløkkiliðið kom á staðið, hevði eldurin breitt seg um allan bilin, og hann var kolaður upp. Talan var um eitt bilvrak, og orsøkin til eldsbrunan er ikki staðfest. Men løgreglan kannar málið.

- sae -

Ferðsluóhapp

Klaksvík:

Tíðliga sunnumorgunin var eitt ferðsluóhapp í Klaksvík. Ein bilur rendi á ein pela, og bilførarin er undir illgruna fyri at hava koyrt ávirkaður av rúsdrekka. Um sama mundið fekk løgreglan eina fráboðan um, at ein maður gekk í ørviti í býnum. Hesin varð so tikin inn á støðina at sova rúsin av sær. Annars sigur løgreglan, at tað hevur ikki verið nakað serliga ófriðarligt í býnum um vikuskiftið.

- sae -

Leysir hundar gera aftur um seg

Leysgangandi hundar lata til at vera ein afturvendandi trupulleiki. Um vikuskiftið kom løgreglan í Klaksvík fram við einum húsum, har ein leysur hundur hevði gjørt ónáðir

LØGREGLUTÍÐINDI
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Klaksvík:

Um midnáttarleitið leygarkvøldið kom løgreglan fram á ein posa við skrelli, sum lá rivin og skræddur mitt á vegnum. Løgreglan fylgdi sporinum til eini hús, har skrellið átti at standa.

Tá løgreglan kom til húsini varnaðust tey, at øll klæðini, sum ivaleyst hava hingið á snórinum fyrr um kvøldið, lógu rivin sundur á bønum.

– Her er ongin ivi um, at tað er talan um leysgangandi hund, sum ger ónáðir, sigur vakthavandi. Løgreglan veit, hvat tað er fyri ein hundur, og eigarin kann vænta sær eitt endurgjaldskrav frá eigaranum av klæðunum og bót frá løgregluni fyri brot á hundalógina.

Annars er ein skipan við hundafangarum aftur farin at virka í býnum eftir at ongin virkin skipan hevur verið í eina tíð. Við Norðlýsið í seinastu viku, segði borgarstjórin Steinbjørn Jacobsen, at um fólk verða órógvað av leysum hundum, kunnu tey ringja til løgregluna, sum so boðar fólki frá Ansni frá. Og Ansni tekur sær so av hundunum.